# VARPIÐ



Kanal 5 • Týsdagin kl. 20.00

## Sweet Home Alabama

Melanie Carmichael (Reese Witherspoon) er ein ungur mótadesignari, sum er forlovað við Andrew, sum er son sjálvan borgmeistaranan í New York. Ein dagin biður Andrew Melanie gifta seg við sær, og hon er ovurhonds glað. Har er tó bert ein trupulleiki. Hon er longu gift við einum manni úr heimbýnum, so nú má hon allan vegin aftur fyri at fáa gomlu flammina at upploysa giftarmálið.



Tv3 • Sunnudag 21. kl. 20.00

## My Big Fat Greek Wedding

Toula Portokalis er ógift og so er hon 30 ára gomul. Hetta er ein trupulleiki, tað er hon vís í. Hon hittir studentaskúlalæraran Ian, sum hon fellur fyri við brestin. Men Ian er ikki so grikskur, sum Toula, og meiri enn, sum familjan hjá henni, vil hava hann at vera. Fínur amr./kanadiskur skemtifilmur frá 2002.



Kanal 5 • Mánadagin kl. 20.00

## Catwoman

Patience Philips er ein smæðin kontormús, sum arbeiðis sum grafikari fyri Hedare Beauty. Hennara tilvera gerst tó ein heilt onnur, tá hon endar mitt í eini vinnugølu, har tann ónda Lauren Hedare eisini er innblandað. Patience verður samstundis eftirlýst av løgregluni, tí hon er broytt til Catwoman. Hon hevur nú fingið allar teir somu eginleikarnar sum ein ketta.



Tv3+• Hósdagin kl. 20.00

## 13 snart 30

Jenna er 13 ára gomul, og hennara foreldur eru rættiliga strang. Allir teir populeru næmingarnir í skúlanum hyggja mest sum ígjøgnum hana, og drongurin, hon er forelskað í, veit ikki, at hon er til. Tað einasta, sum Jenna ynskir, er at blíva vaksin skjótast møguligt. Tá hon so brádliga vaknar dagin eftir sín 13 ára føðingardag, finnur hon út av, at hon brádliga er 30 ára gomul.

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

Sosialurin

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið